### Illa viðfarnir í Guantanamo

Tríggir bretar, sum sluppu ú amerikonsku fangaleguni í Guantanamo fyri fýra mánaðum síðani eftir at hava sitið har í meiri enn tvey ár, halda uppá, at teir vórðu illa viðfarnir, meðan teir sótu fangar.

Í einari drúgvari frágreiðing, sum sakførararnir hjá teimum trimum hava skrivað, verður millum annað sagt, at ein hermaður helt einari byrsu ímóti høvdinum á einum av fangunum, meðan hann varð avhoyrdur. Hesin sami fangin hevur greitt frá, at hann bleiv sligin fleiri ferðir, og at hann fekk ikki frið at sova. Ein annar av fangunum greiðir frá, at hann bleiv koyrdur inn í eitt rúm við sterkum ljósi og hørðum tónleiki.

Sambært frágreiðingini var ein bretskur heryvirmaður ímillum teirra, sum avhoyrdu fangarnar, og hann nýtti eisini harðliga framferð. Bretska verjumálaráðið sigur, at tað fer at kanna skuldsetingarnar, men amerikanska verjumálaráðið hevur harafturímóti sagt, at tað fer ikki at gera nakað við málið.

### Venjingar í Murmansk

Hesa vikuna hava servandir russiskir hermenn verið við í einari venjing, har teir hava lært, hvussu teir skulu bera seg at, um onkur yvirgangsfelagsskapur skuldi roynt at fáa fatur á russiskum kjarnorkuvápnum.

Venjingin, sum sambært Reuter er tann fyrsta av sínum slagi í Russlandi, hevur verið á leiðini við Murmansk. Russar hava nógv kjarnorkuvápn á hesum leiðunum, og har eru eisini stórar goymslur við ymsum kjarnorkuburturkasti, sum kann vera vandamikið, fáa yvirgangsmenn fatur á tí. USA og onnur lond hava leingi sagt seg stúra fyri, at yvirgangsmenn skulu royna at útvega sær kjarnorkuvápn ella tilfar til slík vápn úr Russlandi, og nú er líkt til, at russisku myndugleikarnir hava sett sær fyri at forða tí.

Samstundis sum teir russisku hermenninir venja seg til at verja kjarnorkuvápnini, eru serfrøðingar í ferð við at tryggja goymslurnar við Murmansk. Hetta arbeiðið er fíggjað við pengum úr fleiri londum.

### Horvnir í 54 ár

Herfyri vórðu líkini av tveimum amerikonskum hermonnum, sum fullu í Koreakrígnum, grivin uppaftur, og í gjár komu tey til USA.

Enn veit eingin, hvørjir teir báðir hermenninir vóru, men sambært teimum norðurkoreansku myndugleikunum fullur teir í bardaga ímillum ta sjeyndu amerikonsku herdeildina og kinesiskar hermenn við býin Chosin í november ella desember í 1950. Líkini eru nú á einari herstøð á Hawaii, og har skulu serfrøðingar royna at fáa staðfest, hvørjir teir báðir hermenninir vóru.

USA misti 37.000 hermenn í krígnum í Korea, sum vardi frá 1950 til 1953. 8.100 hermenn komu ongantíð afturíaftur. Amerikanararnir hava leingi hildið uppá, at nógvir av hesum monnunum sita framvegis í norðurkoreanskum fangalegum, men tað hevur Norðurkorea avsannað. Í 1996 samdust londini um at kanna, hvat var vorðið av teimum 8.100 monnunum. Higartil eru 180 lík funnin og send aftur til USA. So seint sum fyri nøkrum døgum síðani vórðu nøkur lík funnin afturat.

### Rockstjørnur í valstríði

Fleiri av teimum best kendu amerikonsku rockstjørnunum hava gjørt av at skipa fyri konsertum í sambandi við forsetavalið í heyst.

Bruce Springsteen, REM, Pearl Jam, Dixie Chicks og onnur spæla á konsertunum, og tey dylja ikki fyri, at tey vilja hava eina broyting í amerikanska politikkinum. Við blaðið Los Angeles Times sigur Bruce Springsteen, at hann stuðlar demokratiska valevninum, John Kerry. Tað kemur ikki óvart á nakran, tí undir valstríðnum hevur Kerry nýtt fleiri løg hjá júst Bruce Springsteen sum t. d. "No Surrender", "The Rising" og "The Land of Hope and Dreams".

Tann fyrsta konsertin verður í Pennsylvania í oktober, og síðani fara rockstjørnurnar til Florida og sjey aðrar statir, har veljararnir framvegis ikki hava tikið støðu til, hvørt teir skulu velja Kerry ella Bush.

## UTTAN ÚR HEIMI

# Taliban stóra framgongd

**Hóast Taliban-stýrið í Afghanistan bleiv rikið frá, hevur rørslan ment seg nógv síðani**

TALIBAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Týsdagin kunngjørdi amerikanska herleiðslan í Afghanistan, at umleið 50 limir í Taliban vóru falnir í bardaga við amerikanskar hermenn. Sambært Reuter hevur eingin annar hevur váttað tíðindini, og diplomatar siga við tíðindastovuna, at eru tíðindini sonn, er tað bara ein staðfesting av, at Taliban-rørslan er farin at gera um seg av nýggjum.

The New York Times skrivaði mánadagin, at nógvir Taliban-hermenn fáa venjing í Pakistan, sjálvt um pakistanska stjórnin alment hevur sett rørsluni forboð fyri at virka í landinum. Ein talsmaður hjá pakistansku fregnartænastuni segði við blaðið, at nógvir pakistanar hjálpa Taliban-hermonnunum, og hann helt, at rørslan er eini 50 prosent sterkari í dag enn fyri bara einum ári síðani. Sambært talsmanninum er rørslan so sterk í summum pørtum av Pakistan, at teir almennu myndugleikarnir hava ilt við at hava tamarhald á viðurskiftunum har.

Amerikanskar keldur hava í seinastuni sagt, at Taliban er vorðið ein veksandi hóttan ímóti teimum amerikonsku hermonnunum í Afghanistan. Herfyri gjørdi hjálparfelagsskapurin Læknar uttan Landamark av at fara úr Afghanistan, tí tað er ikki nóg trygt at arbeiða har.

# Vápnað havnareftirlit




*Ta seinastu vikuna hava amerikonsku myndugleikarnir hert eftirlitið í New York munandi. Í gøtunum ganga vápnaðir løgreglumenn, og í havnini sigla vápnaðir bátar aftur og fram. Her fer ein teirra fram við einari ferju nærhendis Manhattan*

*Mynd: Reuters*

# Kidman og Penn í ST

**Fyri fyrstu ferð í meiri enn 50 ár hevur ST játtað Hollywood at taka ein film upp inni í aðalfundarhølinum í ST-bygninginum**

FILMSUPPTØKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, var hvørki til at høgga ella at stinga í, tá tann kendi filmsmaðurin Sidney Pollack herfyri spurdi, um hann kundi sleppa at nýta høvuðsskrivstovuna hjá ST til eina filmsupptøku. Svarið var nei, og Kofi Annan kundi eisini vísa á, at hesa støðuna hevur ST havt í meiri enn 50 ár.

Men á einum fundi fyri stuttum eydnaðist tað Sidney Pollack at sannføra Kofi Annan um, at filmurin skal vísa á, at diplomatiið er betri enn harðskapur, og so slakaði aðalskrivarin. Men hann hevði ikki heimild til at taka avgerðina einsamallur, og tí mátti hann fáa góðkenning frá øllum teimum 15 londunum í trygdarráðnum fyrst.

Tað eydnaðist eisini, og í summar hava Sidney Pollack og leikararnir so gingið runt í ST-bygninginum og vant seg við umstøðurnar har. Millum leikararnar eru so kend nøvn sum Nicole Kidman og Sean Penn.

Filmurin kostar 80 milliónir dollarar, og hann skal eftir ætlanini vísast í februar næsta ár.



# Tvær bøkur hjá Jostein Gaarder á føroyskum




*Norski rithøvundurin, Jostein Gaarder við bókunum »Appilsingentan« og »Heimurin hjá Suffíu«, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags júst hevur givið út á føroyskum. Týtt bókurnar hava ávikavist Laura Joensen og Edvard Olsen*

*Mynd: Maria Olsen*

**Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út tvær bøkur eftir Jostein Gaarder, *Heimurin hjá Suffíu* og *Appilsingentan***

BÓKAÚTGÁVA

*Heimurin hjá Suffíu* er ein bergtakandi gáta, ein skaldsøga, sum ger lesaran bilsnan, vitandi og glaðan. Bókin er týdd til 49 mál og er seld í meiri enn 25 milliónum eintøkum. Í 1995 var hon mest selda skaldsøgan í heiminum. Edvard Olsen hevur týtt til føroyskt.

Ein dagin, tá ið Suffía kemur heim úr skúlanum, finnur hon eitt bræv í postkassanum. Á lítla lepanum í brævbjálvanum stendur: *Hvør ert tú? Hvaðani kemur heimurin?*

Hetta er byrjanin til heimspekiliga ævintýrið hjá Suffíu - frá Sokrates til Descartes, frá Spinoza til Hegel, Marx og Freud - saman við gátuføra lærarianum í heimspeki, sum ikki vil siga, hvør hann er. Men hetta er ikki tað einasta gátuføra í bókini. Hví fær Suffía postin hjá Hildu? Hvør er Hilda? - og hvør er Suffía?

Fyri at loysa gáturnar brúkar Suffía sín nýggja kunnleika til heimspeki, men svarið er nógv meira undrunarvert, enn hon hevði hugsað sær.

Í søguni í søguni sigur Jostein Gaarder frá um heimspeki, um stóra loyndarmálið við lívinum og heiminum rundan um okkum.

»Ársins skaldsøga.... Søgan er so spennandi, at tú klárar næstan ikki at leggja bókina frá tær... Og bókin er ikki bara skrivað til tey ungu. Vaksin fólk fara heilt vist at gerast klókari,« skrivaði Harriet Eide í ummæli í Dagbladet

*Heimurin hjá Suffíu* er 525 bls., umbrotin og prentað á Einarsprent og kostar 280 krónur í bókabúðunum.

*Appilsingentan* er fyrsta ungdómsskaldsøgan hjá Jostein Gaarder í tíggju ár. Hon kom í fjør út á 22 málum samstundis. Laura Joensen hevur týtt til føroyskt. Ummælini av bókini í Noregi vóru sera góð:

»Ungdómsbók, ið djarvt nemur við stórar spurningar - lívið og deyðan,« skrivaði Dagbladet.

*Appilsingentan* snýr seg um Georg, sum er fimtan ára gamal. Hann er sum aðrir stórir dreingir, men so ein dagin fær hann eitt bræv, sum pápin hevur skrivað til hansara, beint áðrenn hann doyði. Í brævinum skrivar hann um leitanina eftir tí gátuføru Appilsingentuni, ein duldarfull vera, ið hann hittir tey mest óvæntaðu støðini.

*Appilsingentan* er ein heit, veruleikakend og bergtakandi søga um at liva, elska og doyggja - ein nýggj hugvekjandi søga, sum væl tolir at verða sett undir liðina á øllum teimum virðisløntu bókunum hjá høvdundanum.

*Appilsingentan* er umbrotin og prentað á Hestprent og kostar 140 krónur í bókabúðunum.

Í hesum døgum er Jostein Gaarder í Føroyum í sambandi við Listastevnuna. Sunnudagin klokkan 16.00 fer Jostein Gaarder í samrøðu við Ivan Niclsen at tosa um skaldskap sín.

# Reyði Krossur við neyðhjálp til Darfur

**Dansk Røde Kors og Norges Røde Kors saman um at skipa sjúkrahús og koyrandi sjúkraklinikkir í DAFUR økinum**

NEYÐHJÁLP
*Reyði Krossur Føroya*



*Hesin sudanesiski drongurin úr Darfur-økinum bíðar eftir neyðhjálp í Dredjin flóttafólkaleguni*

*Mynd: Reuter*

Nú tað er eydnast neyðhjálparfelagskapum at koma inn í landslutin Darfur at veita hjálp, er eitt sjúkrahús, ið annars stóð at kalla tómt fyri útgerð, gjørt somikið í stand við hjálp frá Reyða Krossi, at til ber at veita sjúkum og skaddum hjálp.

Reyði Krossur Føroyar veitir kr. 50.000 í stuðul.

Tað eru fólk og pengar frá Norsk og Dansk Røde Kors, sum hava fingið hetta í lag. Um ein millión fólk á staðnum tørva hjálp, stórar mongdir av fólkinum eru flýdd undan harðskapi og neyðin er óendalig.

Um 200.000 flóttar úr Darfur eru komin um markið til Tchad.

Flóttalegan í Tchad hevur hjálp fyri neyðini, og fór flogfar 2. august úr Billund við mati, heilivági og øðrum til tey neyðstøddu. Eisini er sjúkrasystur og annað hjálparfólk við.

– Peningurin vit veita er fingin við gávum og innsavningartiltøkum seinasta vetur. Einhvør kann hjálpa okkum at hjálpa við at tekna seg sum lim, limagjaldið er: húski kr. 150,- og feløg o.l. kr. 400,- til Giro 53252 ella at veita okkum eina gávu, kontu í peningastovnum. Til ber at ringja 905656, so tekur Føroya Tele kr. 100,- frá tær og avroknar til Reyða Kross, sigur Reyði Krossur Føroya í tíðindaskrivi.

Tú finnur heimasíðurnar hjá Reyða Krossi í øllum londum við at leita á WWW.redcross.fo

